# Feskt føroyskt

**Norðurlendska filmsvikan byrjaði við eini føroyskari frumsýning, og seinasti dagurin var eisini givin til føroysk verk. Umfram »Ein regla um dagin man vera nokk« vóru sjey nýggir føroyskir stuttfilmar sýndir**

FØROYSKIR STUTTFILMAR

Filmur, sum list, blómar kring allan heim. Norðanlond hava prógvað seg at vera før fyri at framleiða góðar filmar. Í Føroyum hevur filmslistin ikki fylt nógv, men sendingin Agurk og Klippfisk hava bæði givið íblástur og vón til føroysk listafólk, innan hetta økið.

Klippfisk og onnur sýndu fríggjadagin sjey nýggjar føroyskar filmar. Filmarnir eru frá tveimum minuttum til ein hálvan tíma til longdar. Millum filmarnar var eisini »Mítt Rúm«, ið Heiðrik av Heygum frumsýndi, sum fyrstu sýning í filmsvikuni.

### »Morgunsmíl«

Ungi Andrias Høgenni, ið fyrr hevur víst sínar gávur innan filmslistina, greiddi frá sínum filmi. Heitið kemur av evninum, ið eru skortar, ið fólk nýta. Undir yvirflatuni liggur nakað annað enn tað, ið eygað ber.

Filmurin er væl spældur og ikki minst sera væl filmaður og framleiddur. Hugskotið er gott og søgan kundi mint um okkurt, við íblástri úr onkrum verki eftir Leif Panduro. Tað sást langan veg at nógv arbeiði lá í hesum, nógvir sjónleikarar, útgerð og øki vóru nýtt.

### »Skitna onkið«

Stuttfilmurin eftir René Bishoff og Janus Rasmussen er um eina kenslu, var greitt frá. Hann er filmaður við einum talgildum upptøkutóli, og hetta merkti nógvar avmarkingar og gav honum eina serstaka kenslu.

Upplivingin av filminum var óhugnalig. Myndirnar vóru ofta kornutar og skitnar, høvuðspersónurin var órógvandi og kenslan, ið var lýst kendist verulig. Fleiri myndir kundu verið av íblástri úr japanskari filmslist, skjótar klippingar og løgnar myndir.

Endamálið var rokkið og kenslan stóð klár, ein óhugnaligur, løgin filmur. Filmurin er at finna á www.YouTube.com.

### »Fragmented Unison«

MarMar, ið er eitt samstarv millum føroysku Marionnu Mørkøre og svensku Mariu Arnell, stendur fyri hesi framleiðsluni.



*Bergur Johannesen ummælir*

Filmurin, ið vardi tveir minuttir var sera krevjandi at hyggja eftir. Skjótar klippingar av fimm einstáttaðum gentum í føroysku náttúruni. Hann var svartur og hvítur, og púrasta ljóðleysur. Ein listarlig komposition – men ein løgin strævin uppliving.

### »Two one side«

Eitt seks minuttir langt verk eftir MarMar. Hesuferð vóru nøkur fólk í svørtum og hvítum klæðum í eini skóg og við eitt vatn. Nógvar skjótar klippingar og meginpartin av tíðini var filmurin svartur og hvítur. Tónleikin, ið var afturvið, stóð Teitur fyri og hann riggaði sera væl til. Eisini ein krevjandi løta.

### »Throwing paint tins off the roof«

Ingun í Skrivarastovu var onnur av teimum, ið stóð fyri hesi framleiðslu. Filmurin er ein dokumentar, um økið Berthnal Green. Sosiala umhvørvið, framtíð og fortíð eru væl lýst gjøgnum frágreiðingar og gamlar myndir, sett saman við broytingum, ið fara fram har í nútíðini. Frágreiðingarnar hoyrast, men fólkini verða ikki filmað, men myndir av bygningunum vístar. Filmurin var væl gjørdur, men fyri mítt viðkomandi sera óviðkomandi og harvið óáhugaverdur.

### »Í hansara hondum«

Ein løtumynd úr atelierinum hjá Janusi Kamban. Hans Pauli Olsen arbeiðir við eini standmynd, ið skal vera av Tróndi í Gøtu og teir báðir minnast aftur á gamlar tíðir. Áhugaverd dokumentar og viðkomandi viðurskifti. Upptøkutólið er hondhildið og myndirnar ofta skeivar og øðrvísi. Týðiligt er at hendan framleiðslan ikki er væl fyrireikað, men heldur spontan. Hóast alt, er filmurin áhugaverdur at hyggja eftir.

TVØROYRAR KOMMUNA

## Stuðul til barnaansingina í Suðuroy

**Søkt verður eftir stuðli til 5 ára gamalt barn at byrja skjótast gjørligt.**

Arbeiðsøkið er Dagstovnurin Mýrifípan í Trongisvági, fyrrapartar og Spælistovan hjá Dagrøktini í Sumba, seinnapartar. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Arbeiði krevur, at tú skalt koyra barnið til og frá Mýrifípuni og Spælistovuna.

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur eina námsfrøðisliga ella aðra viðkomandi útbúgving
- At tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir
- At tú ert tolin og vísir umsorgan
- At tú dugir at síggja møðuleikar frammum forðingar
- At tú hevur virðing fyri børnunum, foreldrum og starvsfeløgum
- Tú verður ein partur av einum tvørfakligum toymi.

Tín arbeiðsuppgáva fevnir um at stuðla og menna barnið, og fylgja teimum tiltøkum, ið eru/verða sett í verk uttan fyri heimið, t.d. fara til venjingar.

Lønin er sambart sáttmálað við avvarðandi fakfelag og KAF ella Fíggjarmálastýrið.

Umsókn, saman við prógvi og viðmælum, verður at senda til Dagstovnin Mýrifípan, Smærugøta 8, 826 Trongisvágur innan **fríggjadagin 24. okt. kl. 12**

Um ongin við viðkomandi útbúgving søkir starvið, verður hjálparfólk sett í staðin.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Guðruna Petersen, Leiðara í Mýrifípuni, tlf 372700 ella Súsonnu Poulsen, leiðara í Dagrøktini, tlf 281339

## Sløkkiliðsfólk til Fuglafjarðar sløkkilið

Fuglafjarðar kommuna søkir hervið eftir leysum sløkkiliðsfólki M/K til Fuglafjarðar sløkkilið til setan **1. desember 2008** ella skjótast eftir hetta.

Sum treyt verður sett, at viðkomandi skal hava heilsuváttan, revsiváttan og stóra koyrikortið. Tó kunnu persónar, sum ikki lúka krøvini fyri koyrikorti, søkja størvini við teirri treyt, at hetta verður fingið til vega skjótast, um teir verða settir í starv.

Somuleiðis verður kravt, at umsøkjarar antin hava ella skulu taka neyðugt grundskeið í 1. hjálp. Neyðuga víðari útbúgving sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsfólkum skipar Fuglafjarðar sløkkilið fyri.

Møguligir umsøkjarar skulu verða búsitandi í Fuglafirði ella Kambsdali og skulu arbeiða í økinum.

Nærri upplýsingar um størvini eru at fáa frá brunastjóranum Jóhann Clementsen á telefon 737800.

Møguligar umsóknir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Norður í Gerði 10, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi fríggjadagin **7. november 2008 kl. 15.00.**

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 16. oktober 2008*

Fuglafjarðar kommuna

# Bara eitt skot



**Ein øðrvísi filmslistarlig roynd sum Linda Wender hevur gjørt. Eitt toymi av átta fólkum hava staðið fyri framleiðsluni. Navnið »One Shot« kemur av tí, at 78 minuttir langi filmurin er tikin upp í einum, uttan eitt einasta klipp**

»ONE SHOT«

Endamálið við filminum er at gera ein bíligan, øðrvísi film. Uttan eitt tað einasta klipp var filmurin tikin upp.

Dóttirin Sally kemur heim til mammuna. Forholdteirra er ikki gott, og tað ger tað ikki betur at elskarin hjá mammuni er har. Nógv verður lagt á borðið og nógv hendir hesar 78 minuttirnar. Søgugongdin er júst eins lang sum filmurin og gongur fyri seg á somu tíð á degnum.

Hugskotið er fínt og framleiðslutoymið er komið væl frá tí. Við hesum filminum varð víst at til ber at framleiða ein góðan film, uttan at vera í Hollywood. Søgugondin er væl skrivað og persónarnir eisini væl úthugsaðir. Filmingin er sum væntað av einum slíkum filmi. Nógvar óneyðugar myndir og drúgvar senur.

Filmurin er samanumtikið ikki serstakliga góður, men frálíkur, tá hugsað verður um umstøðurnar. Hóast filmurin er ein væleydnað roynd, meti eg ikki at hetta slagið av filmi átti at verið óneyðuga nógv dyrkað.